# ysi









málar so fjáltrandi neyvt og við so mongum og glitrandi litum, at tað beinleiðis er strævið at hyggja at. Detaljurnar eru so nógvar, at tær leypa saman í eyganum, sum at byrja við sær myndirnar sum einslittar flatar. Tá farið verður nærri, opinberar myndevnið seg í øllum sínum vulgera neyvleika sum eitt fýrverk av litum og skapum og fert tú heilt tætt at myndunum, fert tú helst at hugsa um hvussu nógva tíð tað hevur tikið at mála verkið. Hetta, at áskoðarin gerst varur við tíðaraspektið er sera umráðandi fyri málaran, ið heldur vil kallast konsept- enn blómumálari

## Moderna málarí

At samtíðarmálaríið er væl inni í hitanum fyri tíðina sæst á hvussu væl umboðað hetta listaslag er í løtuni í gallaríum, í framsýningum í listasøvnum, í listabókaútgávum og hvussu væl tað verður móttikið millum listaáhugað. Tað er serliga tað figurativa málaríið, sum hevur havt góðan byr í seinastuni og hetta hevur fingið onkran at finnast at hesum ráki, ið verður skýrt konservativt og vinnufikserað. Tað er óivað rætt, at framgongdin hjá tí nýggjara figurativa málarínum er knýtt at hákonjunkturi, vaksandi frívirði og keypiorku, eins og tað møguliga hevur okkurt við fólksliga gleði yvir at duga at skyna á myndevni at gera. Men hetta vil sjálvandi ikki siga tað sama sum, at figurativu verkini eru vánalig. Tvørturímóti eru mong av listafólkunum sera gávurík, væl útbúgvin og væl fyri uppá allar mátar, eins og teirra verk eru merkt av einum serligum ikonografiskum frískleika og frælsi í tilgongdini til málaríið, eisini t.d. í mun til hvaðani íblásturin kemur. Teknirøðir, telduspøl, broderí og gentubløð er javnsett meira klassiskum tilsipingum eins og vit síggja dømi um í hugtakandi verkinum hjá Magnus Wallin, "Anatomic flop", ið lýsir menniskjans hjálparloysi í mun til tær treytir, hon er undirløgd. Verkið er ein teldugjørdur filmur, ið lýsir nakrar skapningar, ið eru staddar sum livandi keylur á einari bowling- ella rennibreyt, sum teir royna at stríða seg fram eftir. Hóast myndamálið er telduslætt og moderna, eru spennandi listasøguligar tilsipingar bæði til griska fornøld, eins og stóri denturin, ið verður lagdur á sentralperspektivið fær ein at hugsa um renesansuna.

## Málaríið sum høvi

Innan nýggja figurativa málaríið eru nógvar av myndunum eins og tær hjá Katrine Ærtebjerg at síggja til hugnaligar og elskuligar. Tá tú so hyggur nærri at teimum, gerast tær meira álvarsamar og ofta eitt sindur óhugnaligar. Sjónarhornið er sjálvsævisøguligt við støði í dreymum og dagligum hendingum, ið verða lýstar við einfaldum myndamáli og bjørtum litum í eini samansettari fantasy-verð. Ævintýrdámur er eisini yvir myndunum hjá Lise Blomberg Andersen, ið málar smáar broderílíkar málningar við smáum blómum og fuglum við menniskjaandliti. Gráligu litirnir lita huglagið syrgið og kalt. Sjálvt um andlitini smíla, eru skapningarnir í hesum myndaheimi avbyrgdir uttan veruligt samband við hvønn annan. Sjónarhornið í myndunum hjá vinnaranum Karin Mamma Andersson er meira realistiskt. Í vinnaramyndini "Vi arbetar alltid så nära varandra utan att veta om det" tykist sjónarhornið beinleiðis sosialrealistiskt við ynski ella áheitan um størri felagssskap millum okkum menniskju. Tað, at tann málandi listamaðurin er longur frammi í myndaforgrundini enn listakvinnan, gevur ábending um nakað politiskt ella feministiskt í myndunum. Men tá tú stendur framman fyri hesum myndunum, er tað meira tað formliga málandi árinið, sum hugtekur. Kanska er hetta meira l´art pour l´art ella málarí sum høvið fyri at sleppa at mála eins og vit kenna tað í myndunum hjá gamla barokkmeistaranum Velazquez. Hesin hevði eisini á sama hátt sum Karin Mamma Andersson serligan tokka til myndir í myndini, sum økja um fjølbroytni bæði tá tað kemur til intellektuella og málandi góðsku. Hesar myndir eru ikki kollveltandi, men góð dømi um hvussu markleyst dygdarmálaríið er. Føroysk listafólk hava, sum áður nevnt, ikki luttikið í Carnegie Art Award høpi higartil, men eru við í tilnevningini til næsta ár.